# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Av tí at Rás2 sendir frá Oyggjaleikunum á Álandi alla hesa vikuna, er sendingin Bilradio tikin av skránni. Bilradio verður aftur hósdagin 9. juli kl. 17.10*



*VN1700 Voyager er flaggskipið hjá Kawasaki*

# Flaggskipið hjá Kawasaki

**Tann nýggja Kawasaki VN1700 Voyager er nú royndarkoyrd av danska MC-blaðnum Bike. Súkklan kostar 214.000 krónur í Føroyum**

MC

Kawasaki VN1700 Voyager er tann flottasta súkklan hjá Kawasaki og flaggskipið hjá teimum.

Súkklan er nú royndarkoyrd av danska MC-blaðnum Bike, og fær hon sera gott ummæli.

Vatnkøldi V2 motorurin er ein uppliving í sær sjálvum, serliga tí hann er so stillur og ljóðleysur í tómgongd. Motorurin er ein sera kvikur V2 (1.700 cc) við 74 hk við 5.000 snún/min.

VN1700 Voyager er væl egnað til langar túrar. Hon er sera væl útgjørd við t.d. síðutaskum og toppboks aftanfyri baksetrið umframt fleiri minni handskarúm. Eisini hevur hon cruise-kontroll og eina nýggja framkomna ABS bremsuskipan.

Tað er MC-Sølan í Slættanesgøtu, sum umboðar Kawasaki motorsúkklurnar. Kawasaki VN1700 Voyager kostar 214.000 krónur í Føroyum. www.mc-solan.fo" www.mc-solan.fo

mg

# Truckarar til Nordic Trophy

**Føroyskir truckarar fara í august til størsta truckerfestivalin í Skandinavia**

Í sambandi við størsta truckerfestivalin í Skandinavia, Nordic Trophy, sum verður í Linkjøping í Svøríki í døgunum frá 28.-29. august skipar Trucker. fo fyri eini ferð úr Føroyum frá 27. til 30. august.

Flogið verður úr Vágum hósdagin 27. august kl. 08.15 til Kastrup. Síðan verður koyrt við bussi til Linkjøping, har festivalurin er. Gist verður á Quality Hotel Ekoxen í 3 nætur. Heimferðin verður aftur úr Kastrup sunnudagin 30. august kl. 19. Ferðin verður løgd til rættis av ferðaskrivstovuni Fonn Flog í Klaksvík.

Tekning fer fram hjá fyriskiparunum av føroyska Trucker Festivalinum Leif Eliasen ella Hugo Skorastein. Meira upplýsingar á: www.trucker.fo

mg




*Nordic Trophy er størsti truckerfestivalur í Skandinavia*